LM-057/2025

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

5. februar 2026
Mál: 25/20844-48
Tygara skriv:
Viðgjørt:

LM-057/2025 : Uppskot til løgtingslóg um at gera ábøtur og umvælingar í H-bygninginum á Landssjúkrahúsinum

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum var á fundi við Løgtingsins fíggjarnevnd tann 9. januar 2026, saman við Landsverki og Landssjúkrahúsinum. Á fundinum varð verkætlanin umrødd, og svaraðu landsstýriskvinnan, Landsverk og Landssjúkrahúsið spurningum frá nevndini. Fíggjarnevndin vildi hava eina nærri lýsing av, hví munur er á metingini í juni 2025 frá sýnsmanninum, sum var 14,5 mió. kr. og metingini, sum nú liggur til grund fyri verklagslógini, sum er 33,8 mió. kr.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið undir brotinum fíggjarligar avleiðingar verður greitt soleiðis frá: "Eftir at lekar vóru staðfesetir í H-bygninginum varð ein kanning gjørd av óheftum sýnsmanni, ið metti, at kostnaðurin var 14,5 mió. kr. at umvæla manglarnar, tó so at eyka umfar av spurningum er ávegis í mun til sýnsfrágreiðingina. Síðani er nýggj meting gjørd, og er kostnaðurin nú mettur at verða 32,8 mió. kr. Tá eru 2,5 mió. kr. íroknaðar, ið svara til tað arbeiðið, ið er og verður gjørt fyri at avmarka skaðar, ímeðan hetta mál er í viðgerð." Harumframt veðrur roknað við 1 mió. kr. til gerðarrættarmál og sakarmálskostnað.

Kostnaðarmeting í fylgiskjali til lógaruppskotið er hendan

	Upphædd í kr. uttan mvg.
HVÚ, íroknað raktsur av byggiplássi	21.810.848
Ráðgeving og fakeftirlit	1.884.800
Verkætlanarleiðsla, íroknað byggileiðsla	1.540.200
Sett av til óvæntað/ókent	5.047.170
Pengar lagt út	2.500.000
Sakarmálskostnaðir	1.000.000
Samanlagt, kr. u. MVG	**33.783.017**

Landsverk hevur latið Heilsumálaráðnum frágreiðing eftir fundin við Løgtingsins fíggjarnevnd, og verður soleiðis greitt gjøllari frá um viðurskiftini.

Sýn og meting
Fyrsta óhefta sýnið av lekunum í H-bygninginum varð gjørt og latið pørtunum á sumri 2025. Landsverk hevur í sambandi við sýnsfrágreiðingina sett eyka spurningar til grundalagið fyri kostnaðarmetingina hjá sýnsmanninum.

Útrokningargrundarlagið, var ikki latið saman við óheftu sýnsfrágreiðingini, og tí er trupult at vita, hvat sýnsmaðurin hevur tikið við, og hvat hann ikki hevur tikið við. Tað tykist tó sum um,

at sýnsmaðurin helst ikki hevur tikið við ymsar útreiðslur til eitt nú ráðgeving og fakeftirlit, rakstur av byggiplássi, verkætlanarleiðslu ella óvæntaðar útreiðslur, umframt at metingin um fylgiskaðar sannlíkt er alt ov lág. Harumframt eru eisini sakarmálskostnaðir, ið landið skal rinda í fyrsta umfari. Harafturat kemur, at Landsverk saman við ráðgeva og arbeiðstakara síðani hava staðfest aðrar og øðrvísi trupulleikar, sum hava við sær, at tað lekur.

Kanningar hjá Landsverk
Við støði í sýnsfrágreiðingini, sum byggir á avmarkaðar stakroyndir, hevur Landsverk biðið ráðgevarafyritøku um at standa fyri kanningum. Hesar kanningar vísa, at støðan við lekunum í H-bygninginum er meira samansett, enn tað, sum er lýst í sýnsfrágreiðingini í juni í 2025. Av tí at Landsverk í verandi løtu er í eini tilgongd, har partarnir í málinum skulu verða samdir um eyka spurningar til sýnsmannin, verður sýnsmaðurin fyrst kunnaður um kanningarnar, ið Landsverk hevur gjørt, tá ið spurnaumfarið er av. Enn er óvist, nær hetta verður.

Útreiðslur til ráðgeving, arbeiðstakara, byggitilfar og útgerð á plássinum
Í arbeiðinum at fáa H-bygningin tættan, verður mett neyðugt at prosjektera nýggjar loysnir serliga kring vindeygu- og glaspartíir, úthurðar og í múrkrúnuni. Í hesum sambandi skulu arbeiðir eisini gerast innan, har tikið verður frá kring vindeyguni og umvælt eftir tørvi. Mett verður ikki, at alt hetta er við í sýnsfrágreiðingini.

Verkætlanarleiðsla og fakeftirlit
Arbeiðið viðvíkjandi lekunum kemur at vera í 2026 og væntandi eisini nakað inn í 2027. Hetta merkir, at útreiðslur eru í 2026 og í 2027 til verkætlanarleiðslu hjá Landsverki og til hert fakeftirlit, sum ráðgevin stendur fyri. Í hesum sambandi skal ráðgevin hava prosjektuppfylging og tryggja, at arbeiðið verður gjørt sum fyriskrivað. Talan er um ymiskar loysnir, eitt nú viðvíkjandi vindeygum, glaspartíum, múrkrúnu og fasaduni og at fylgja upp tey inniarbeiðini/fylgiskaðar, sum skulu gerast í hesum sambandi, og er talan um nakrar útreiðslur, sum ikki tykjast at verða við í sýnsfrágreiðingini.

Óvæntaðar útreiðslur
Talan er um ein sera stóran bygning og farið er undir tær fyrstu bráðfeingisábøturnar. Lagt er upp fyri, at komið kann verða á fleiri fylgiskaðar. Neyðugt er tí at hava fíggjarligt rásarúm at taka til, tá og um hetta skuldi vist seg.

So hvørt sum ábøtur vera gjørdar verður kostnaðurin meira neyvur fyri ábøturnar, og vil tað komandi mánaðirnar gerst stigvíst greiðari, um metingarnar eru rættar.

Um Løgtingsins fíggjarnevnd hevur aðrar spurningar, ber til at venda sær til Almanna- og heilsumálaráðið.

Vinaliga

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Bjørgfríð Ludvig
aðalstjóri

LM-057/2025